STARVSLÝSING




## Skrivstovustarv, avloysari

Vilt tú hava eitt skrivstovustarv, har uppgávurnar fevna breitt, og har arbeiðið er á einum høgum góðskustøði, so er hetta ein møguleiki. Vit hava í løtuni eitt avloysarastarv leyst á okkara skrivstovu.

Á skrivstovuni eru 3 skrivstovufólk og eitt teldufólk. Arbeiðið verður gjørt við framkomnum telduskipanum, sum fevna um alt virksemi á stovninum. Skrivstovan virkar sum tænastudeild fyri allan stovnin, sum íalt telur umleið 45 ársverk. Vit húsast á Debesartrøð og á Falkavegi, og sama er galdandi fyri skrivstovuna.

**Starvslýsing**
- Journaliseringsuppgávur av øllum formligum samskifti ið stovnurin stendur fyri. Úrslitið av hesum sæst m.a. á okkara almenna postlista, á www.hfs.fo.
- Bókhald í Búskaparskipan landsins. Talan er bæði um kreditor- og debitorbókhald fyri tær landskassakontur, ið stjórin hevur ræðisrættin yvir.
- Móttøka, herundir telefonmóttøka aðru hvørja viku.
- Tollavgreiðsla.
- Postavgreiðsla, herundir eisini tað, sum viðvíkur kanningarúrslitum, heilsuváttanum, flutningsváttanum, veterinerváttanum o.ø.
- Og mangt annað, ið hoyrir vanliga skrivstovuyrkinum til.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava yrkisútbúgving í skrivstovuyrkinum ella royndir frá einum skrivstovustarvi. Tú skalt verða stinn/-ur í føroyskum.

Kunnleiki til og royndir við at nýta EDV-skipanir er ein treyt fyri at søkja.

Kunnleiki til Búskaparskipan landsins og DocuLive journal skipanina er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

**Persónligir eginleikar**
Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærløgd/nærlagdur, duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt. Stór arbeiðsbyrða, har man ikki altíð fær tann neyguða friðin til arbeiðið, er eisini nakað, ið tú skalt tola.

Fleksibilietur er ein høgt virdur eginleiki, sum vit sum stovnur eisini leggja stóran dent á.

Við setanini verður dentur lagdur á fólk við hollum persónligum eginleikum, og sum dugir at síggja loysnir framum trupulleikar.

**Annað**
Vit syrgja fyri neyðugu upplæringini á teimum virkisøkjum, har tað mangla royndir.

Í tann mun at áhugi er fyri tí, eru nógvir møguleikar fyri eftirútbúgving og víðarimenning innanfyri tað, sum verður bjóðað út í Føroyum.

Arbeiðsstaðið verður á Debesartrøð, har tú ert einsamøll/einsamallur um at manna ta skrivstovuna.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Tú skalt kunna byrja í starvinum skjótast gjørligt. Setanin er tíðaravmarkað til 31/12/2008.

Starvið verður lønt í 3. lønarflokki sambært sáttmála við Starvsmannafelagið, sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. januar 2008.

Upplýsingar um avloysarastarvið fáast frá Bárði Enni, stjóra.

Annars verður víst til heimasíðuna hjá okkum, www.hfs.fo, har tú kanst kunna teg nærri um stovnin og tær uppgávur, ið vit loysa.

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo


